# Brúkarin

Nr. 2 • fríggjadagur • 4. januar 2002 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Máling, lakk og lím



**Máling, lakk og lím innihalda ofta stórar nøgdir av organiskum upploysingarevnum og øðrum heilsuskaðiligum evnum**

Hesi evni kunnu elva til ørilsi, høvuðpínu og andingarneyð, og í ringasta føri skaða livur, nýru og heila. Tað er tí av sera stórum týdningi at vera ansin, og at leggja seg eftir altíð at velja minst vandamiklu evnini. Á íløtunum eru nakrar sonevndar Mal-kodur, sum siga brúkaranum hvørji fyrivarni eiga at takast, áðrenn skjøtil verður settur á arbeiðið.

## Um Mal-kodurnar á íløtunum

### At anda í seg

Talið, sum stendur áðrenn bindistrikuna, vísir til vandan við at anda evnið í seg. Hægri talið er, tess hægri er vandin. Mátistigin gongur frá 00 til 5. Vørur við Mal-kodunum 00-, 1- og 2- kunnu verða nýttar innandura. Vørur við Mal-kodu 3- eiga, sambært nýggjum reglum, innandura bert at nýtast til bæðirúmsgólv og -veggir. Vørur við Mal-kodunum 4- og 5- eiga av privatfólki einans at nýtast uttandura.

### At fáa evnið á húðina

Talið, sum stendur aftanfyri bindistrikuna, vísir til vandan við at koma í beinleiðis samband við evnið. Hagri tal, hægri vandi. Her gongur stigin frá 1 til 6. Eitt evni sum hevur Mal-koduna -1 er vatnkent, -3 og -4 merkir sýra ella etsandi løgur og krevur handskar og verndarbrillur. Vørur, sum eru merktar við -5 og -6, kunnu geva ovurviðkvæmi og krevja serlig verndartiltøk.

### Grøn ráð um máling, lakk og lím

- Nýt vatnbaseraða máling og lakk. Vel evni at taka máling burtur við, við so lágari Mal-kodu sum gjørligt, t.d. 00-1. Lægri Mal-kodan er, lægri er innihaldi av organiskum upploysingarevnum.

- Um tú setir penslar á blot í glasíløtum við terpentin, legg so ein plastposa útyvir, lat posan væl aftur og set tað soleiðis at børn ikki sleppa framat tí.

- Um pensilin ikki skal nýtast fyribils, er brún sápa eitt fínt alternativ til sera vandamikla terpentinið ella reinsibensinið. Gníggja pensilin við brúnari sápu og legg hann í ein afturlatnan plastposa. Fáar dagar seinni er pensilin reinur.

*Kelda: Grøn Information*

## Børnini og vandamiklu evnini

**Her eru nøkur góð ráð, tá ið tú keypur og nýtur sápur, vátserviettar, blæur, suttur og tannkrem til børn**

Børn upptaka skjótari heilsuskaðilig evni enn vaksin. Sápa, krem og sjampo til børn innihalda ofta anga og haldevni, hóast nógv børn ikki tola hesi evni.

### Blæur

Keyp blæur við norðurlendska umhvørvismerkinum "Svananum".

Keyp blæur við ongum luktilsi ella kremi.

### Suttur

Skolda sutturnar áðrenn tær verða tiknar í nýtslu.

### Sápa, krem og sjampoo

Nýt ikki evnir (sápu, krem, sjampoo, salvur o.s.fr.) við anga og royn eisini at sleppa undan haldevnum.

Keyp evni við norðurlendska umhvørvismerkinum "Svananum"

### Tannkrem

Flour er í tannkremi og saman við regluligari tannbusting verjir hetta móti holum í tonnurnum. Smábørn duga ikki so væl at spýta út og at skola munnin við vatni, og tí svølgja tey ofta tannkremið. Av tí at flour kan vera heilsuskaðiligt, eiga vit einans at nýta eina mongd, ið svarar til eina lítla ert.

### Vátserviettar

Nýt ikki vátserviettar við anga til børn. Nýt vatn og einnýtislappar av skúmgummi í staðin.

Tað er sum oftast bara neyðugt at nýta sápu, tá ið barnið hevur kukka í blæuna. Nýt tá eina milda barnasápu uttan anga.

Tak ein vátan lappa ella einnýtislappa í plastposa við út, í staðin fyri vátserviettar.

*Meir fæst at vita á heimasíðuni hjá Grøn Information: www.greeninfo.dk, ella í faldaranum hjá danska umhvørvisstýrinum: Kemi i børns hverdag*

# Klæðir við umhvørvismerking

**Blóman er umhvørvismerkið hjá ES, eins og Svanin er merkið hjá Norðurlondum. Risastóri klædnaídnaðurin dálkar sera illa, og nógv vandamikil evni verða nýtt í framleiðsluni**

Keypið klæði við Blómuni! Hetta var boðskapurin í einum stórum upplýsingarátaki, sum danska umhvørvisstýrið stóð á odda fyri í 2001. Endamálið við átakinum var, umframt at upplýsa um umhvørvismerking, at økja um eftirspurningin av umhvørvisgóðkendum vørum. Og samstundis at styrkja søluna av umhvørvisvinarligum klæðum.

### Blómuklæði eru betri

Blóman er umhvørvismerkið hjá ES, meðan norðurlendska merkið er Svanin. Blómumerkið ger tað lættari at keypa røttu klæðini. Blóman tryggjar at klæðini eru framleidd við færri litingarevnum við tungmettalum, krabbameinselvandi litingarevnum, klori, formaldahydfrígevandi løgi og PVC-prenti t.d. á blusum til børn.

### Brúkarin kan gera mun

Vit brúkarar kunnu gera mun, og við at spyrja eftir umhvørvismerkjum, fáa vit óbeinleiðis ávirkan á hvussu vøran verður framleidd og viðgjørd - úr vøggu í grøv. Frá tí løtu at fræðið av bummulsplantuni á fyrsta sinnið sær dagsins ljós og til klæðini verða burturbeind í hinum endanum. Eftirspurningurin eftir umhvørvismerktum vørum, eru tekin til framleiðararnar um, at vit ynskja reinari vørur. Hesin eftirspurningur fer so aftur til fyrstu liðini í framleiðsluni, og gagna vónandi í seinasta enda umhvørvinum og fólkaheilsunni.

### Umhvørvismerkini Svanin og Blóman

Blóman hjá ES og norðurlendski Svanin eru at finna á nógvum gerandisog nýtsluvørum. Matur, drekka og heilivágur kunnu ikki verða merkt við Svananum ella Blómuni.

Allar vørur tyngja umhvørvi so ella so. Undir framleiðsluni, tá ið tær verða nýttar ella tá ið tær verða burturbeindar. Blóman og Svanin vísa hvørjar vørur eru minst tyngjandi fyri umhvørvi, hóast góðskan á vøruni ikki er lækka. So tá ið tú keypir eina merkta vøru, eggjar tú samstundis framleiðararnar til at framleiða fleiri burðardyggar vørur.

Í dag eru næstan 1300 umhvørvismerktar vørur á danska marknaðinum. Flestu vørurnar eru at finna innan bólkin pappír. Harumframt eru merktar vørur innan hvítvørur, battaríir, reingerð og vask, máling, klæði, sjampoo, sápa, bygging og innbúgv og prentlutir.

### Krøv til vøruna

Tað er upp til framleiðarar og innflytarar sjálvar, at søkja um at fáa eina umhvørvisgóðkenning. Teir skulu sjálvir prógva at vøran lýkur krøvini, sum eru ymisk frá bólki til bólk. Krøv kunnu setast til mangt og hvat, so sum: Má ikki innihalda evni, sum bróta niður ozonlagið, má ikki innihalda tungmetal, skerd nýtsla av vandamiklum kemiskum evnum, orkusparandi, kann endurnýtast og minkar um ruski. Krøvini verða mett av nýggjum triðjahvørt ár, fyri at tryggja at vørurnar framhaldandi verða útviklaðar rætta vegin.

### Fakta um Blómu- og Svanamerkt klæði

Bæði Blóman og Svanin hava reglur fyri klæði. Krøvini eru eitt sindur ymisk, men felags fyri tey er, at klæðini eru millum tey umvhvøvisvinarligastu á marknaðinum. Bæði merkini seta krøv til góðskuna og haldgóðskuna, form og lit. Enn eru einans klæði við Blómuni á marknaðinum, meðan Svanin verður nýttur til vaskievni.

*Kelda: Danmarks Aktive Forbrugere*

# hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 4. januar til hósdagin 10. januar




## Skjulte Spor

Felagin hjá Michael Olsen verður skorin á háls, tá teir eru í holt við at handtaka ein innbrotstjóv. Michael veðrur sendur til Turkalands at koma fyri seg í eina viku, men hevur tað verri enn so ikki gott, tá hann kemur heim aftur og verður sendur út til eitt lík í eini park. Líkið vísir seg at vera ein kvinna, ið eisini er vorðin meiðslað. Michael verður ógvuliga illa við, tá hann sær tað myrdu, og Henriette mistonkir hann fyri at vita meira enn hann fortelur.

## Stand-in for mord




## Nærkontakt af 3. grad




## Sjómanssendingin Vitin




## Nýggjárskonsert úr Norðurlandahúsinum




## Rót ella rútma

Eftir nýggjár er vanligt at ynskja hvør øðrum gott nýggjar, so tað verður hervið gjørt! Í hesum ynskinum liggur ein vón um okkurt gott. Eitt líka gott ár sum undanfarna ár, ella kanska betri.

Jólahald og nýggjárshald hava sjálvsagt merkt skráirnar hjá loftmiðlunum farnu vikurnar. Og nógvar áhugaverdar sendingar hava verið. Bæði í sjónvarpi og útvørpum. At taka allar fram er ov rúgvusmikið. Havi heldur ikki havt stundir at leggja eygu og oyru til alt, ið sent hevur verið, tí so gjørdi ein ikki nógv annað.

Men eitt frískt lot var tað at fáa í stovuna, tá sendingarnar um Fíu og sólstrondina komu á sjónvarpsrútin. Ein lívsjáttandi sending um hetta konubrot, ið greiddi frá um lív sítt langt frá høvuðsstaðnum, men sum tó hevur verið alt annað enn keðiligt, og sum heldur ikki er tað nú, ið árini eru mong, og vetrarmánaðirnir fara í summarhúsinum í Spania.

Tað er so vælsignað hjá okkum øðrum skræðugákum at síggja og hoyra fólk, ið ikki himprast, men gera júst sum teimum lystir. Og júst sum okkum sjálvum lysti at gjørt, høvdu vit møguleikan, ella bara eitt sindur av dirvi.

Bravo!!

**Rót(órudd) ella rútma**

Áhugaverdu sendingarnar hava verið nógvar farnu vikurnar, t.d. prátið við jólagestin Carl hjá Talis.

Mær untist tíverri ikki at fáa alt við, ið sent varð nýggjársaftan, men helst eru tey mong, sum eru í somu støðu, og tí bíða spent eftir endursendingunum. Tað sigst, at útvarpsskemtið var gott. Sá bert brot av sendingini í Svf, Hatta var hatta, ið enn einaferð — um vit hugsa um vertirnar — tyktist nýggj og slóðbrótandi. Og sum tí ikki bert fær góð orð við á vegnum frá øllum. Eg gleði meg til endursendingarnar, so eg betri kann døma um.

Men hetta við hesum nýggja leiðir meg til yvirskriftina, ið als ikki er ein roynd at leggja eftir Petur Rouch og hansara frálíku sending fyri countryfjepparar. Summi kalla hana Rouch og rútma.

Nei, heldur er hetta ein fátækslig roynd at spæla eitt sindur við orðini. Rót (órudd) ella rútma.

Tí, er tað ikki so, at vit eru so fegin um (kanska meira enn nøkur onnur tjóð), at sendingar liggja júst har tær liggja og eru júst sum tær eru? So vita vit hvar vit flóta. Døgurðin fæst nærum ikki niður hjá mongum, uttan eitt álop á Bin Laden og annað úr somu skuffu.

Dagur og Vika er fast akkerspláss flestu vikudagar. Miðlaskráirnar halda skil á degnum.

Men skuldu vit valt millum óskipað viðurskifti ella rútmu, hvat so? Jú, óivað høvdu vit valt rútmuna.

Men kanska ein meira brennandi spurningur er, um ikki henda rútma hevur rurað bæði lurtarar/hyggjarar og miðlar í svøvn. Er ikki heldur langt ímillum í ÚF til dømis, at vit skakast, er ikki tað mesta bakgrundsmusakkur? Sjálvt tíðindastubbar við fleiri deyðsføllum fána. Hvar eru

*Dagfinn Olsen ummælir:*



sendingar, sum bróta úr nýggjum? Sum savna ung sum eldri?

Ofta verður spurt og sammet við gomlu V4 sendingarnar, við beinleiðis undirhaldi kring landið. Kanska er ikki rætt at krevja eina so krevjandi sending aftur á skránna regluliga, men kanska okkurt, sum líkist.

Kanska sendingin Relax hevur verið ein slík roynd, við ymsum úrslitum, men hon er blivin betri og betri og eigur helst at fáa loyvi at menna seg.

Ynskini um gott nýggjár eru skotin í luftina við vón um nýggj stjørnuskot og við vón um rúmd fyri nýhugsan — bæði rútmuni og tí meira rótuta, tí móti vári vakna allar verur aftur úr dvala.